# Mentanarstuðul - leiðreglur

**Kapittul 1 - Endamál**

**§ 1**. Stuðulspolitikkurin er eitt amboð til viðgerð av stuðulsumsóknum til Vestmanna Kommunu.

Endamálið við stuðulspolitikkinum er:

1. at lýsa hvønn stuðul kann verða latin til;
2. at greiða frá, hvør tekur avgerð um stuðul.

**Kapittul 2 - Hvønn stuðul kann verða latin til**

**§ 2**. Stuðulin er í høvuðsheitinum ætlaður at stuðla mentanarligum tiltøkum og verkætlanum í Vestmanna Kommunu.

**§ 3**. Felagsskapir, sum eru á fíggjarlóg landsins, fáa ikki stuðul frá Vestmanna Kommunu.

**§ 4**. Landsdekkandi felagsskapir fáa ikki stuðul frá Vestmanna Kommunu.

**Kapittul 3 - Stuðul til mentanarlig endamál**

**§ 5**. listafólk, áhugafelagsskapir og onnur, kunnu søkja um stuðul til almenn gagnligar framførslur, verkætlanir og líknandi, sum verður hildið í Vestmanna.

**§ 6**. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur, sum búgva ella eru uppvaksin í Vestmanna Kommunu, kunnu søkja um stuðul.

**Kapittul 4 - Stuðul til námsferðir**

**§ 7**. Stuðulin á kr. 500 til námsferðir verður veittur næmingum sum eru undir hægri lesna og sum búgva í Vestmanna Kommunu.

**Kapitul 5 – umsókn um leigan av hølum**

**§ 8**. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur, kunnu søkja um stuðul til leigan av hølum hjá Kommununi.

**Kapittul 6 - Umsóknir og freistir**

**§ 9**. Allar umsóknir skulu latast kommununi umvegis vangan og skal fíggjarætlan fyri verkætlanina viðfestast.

**§ 10**. Umsóknir um stuðul skulu verða kommununi i hendi i góðari tíð, innan peningurin skal nýtast. Umsóknirnar verða viðgjørdar leypandi á fundum hjá Fíggjarnevndini.

**§ 11**. Umsóknir sambært kapittul 4 og 5 verða viðgjørdar av umsitingini sambært hesum leiðreglum.

**Kapittul 7 – Játtaður stuðul**

**§ 12**. Stuðulin verður útgoldin tá ið umsøkjarin kann tryggja at verkætlanin verður hildin.

**§ 13**. Stuðul fellur burtur eitt ár eftir at hann er játtaður, um ikki onnur avtala er gjørd.

**Stuðulspolitikkur hjá Vestmanna Kommunu samtyktur av bygdarráðnum 26.10.2022**

Bjørg á Røgvi,
borgarstjóri